Torkil Vestergaard Rasmussen (Fiskimálaráðið - Sagsbehandler)

Hjem Ny Søg Historisk søg Funktioner Mit arkiv Alle disse ord Indtast søgeord

Sagshistorik ▸ Journalsag FISK: Menningarkvotur 2018: Vestmanna Seafood

Journalsag FISK 18/00213

# Menningarkvotur 2018: Vestmanna Seafood

Mere

## Dokumenter (*)

Ny • Vælg eller træk filer her

| Nr | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00213 8 | Ískoyti til umsókn um menningarkvotur | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 7 | Umsókn um menningarkvotur - Vestmanna Seafood | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 6 | Senda ymisk skjøl, m.a. stovningarskjøl og lániavtalu - Menningarkvotur og Vestmanna Fiskavirki (okkara tilv. 20180151) | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 5 | SV: Menningarkvotur og Vestmanna Fiskavirki (okkara tilv. 20180151) | E mail ud | Journalfør... |
| 18/00213 4 | Kunning um at ongin niðurstøða er gjørd - SV: Menningarkvotur og Vestmanna Fiskavirki (okkara tilv. 20180151) | E mail ud | Journalfør... |
| 18/00213 3 | Nærri kunning um samstarvsavtaluna Menningarkvotur og Vestmanna Fiskavirki (okkara tilv. 20180151) | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 2 | VS: Menningarkvotur og Vestmanna Fiskavirki (okkara tilv. 20180151) | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 1 | Notat Menningarkvotur. | E mail ind | Journalfør... |

◂ 16 - 23

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016: | 7.0 - Fiskivinnuviðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 08 05 2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference(0)

Noter(0)

## Filer i sagen

Ny e-mail Filhandlinger •

| Titel | Status | Dok nr |
|---|---|---|
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 23 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 22 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 21 |
| Skannað í VORN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00213 20 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftunum | Udført | 18/00213-19 |
| 18 00213-17 Fyrispurningur viðv 370379_279791_0 | Udført | 18/00213-19 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftum | Udført | 18/00213-18 |
| 18 00213-17 Fyrispurningur viðv 370379_279791_0 | Udført | 18/00213-18 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftum | Behandles | 18/00213-17 |
| SV_ Menningarkvotur 2018 - Ískoyti til svarskriv | Udført | 18/00213-16 |
| móttøkuváttan | Udført | 18/00213-16 |
| Ískoyti til svarskriv | Behandles | 18/00213-15 |
| 13092018163619 | Udført | 18/00213-15 |
| Menningarkvotur 2018 - Ískoyti til svarskriv | Udført | 18/00213-15 |
| við undirskrift | Udført | 18/00213-15 |

1 - 15 ▸

Journalsag FISK 18/00213

# Menningarkvotur 2018: Vestmanna Seafood

Mere

## Dokumenter (*)

Ny · Vælg eller træk filer her

| Nr | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00213 23 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 22 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 21 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 20 | Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 19 | Fyrispurningur fráboðaður partinum | E mail ud | Journalfør... |
| 18/00213 18 | Uppskot til fyrispurning viðv. landingarviðurskiftum sent Rógva Reinert til góðkenningar | E mail ud | Journalfør... |
| 18/00213 17 | Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftum | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 16 | Menningarkvotur 2018 - Ískoyti til svarskriv | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 15 | Ískoyti til svarskriv | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 14 | Avgerð - tillutan av menningarkvotu | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00213 13 | Bruk av menningarkvotum. Mál 18/00213 10 | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 12 | Upplýsningar viðv. Menningarkvotum. Mál 18/00213 10 | X - Intern... | Journalfør... |
| 18/00213 11 | Ískoytisupplýsningar viðv. menningarkvotum til P/F Vestmanna Fiskivirki | E mail ind | Journalfør... |
| 18/00213 10 | Tilsøgn - Umsókn um menningarkvotur - Vestmanna Seafood | Dokument u... | Journalfør... |
| 18/00213 9 | Nyggj tekningarútskrift, P/F Vestmanna Fiskavirki | E mail ind | Journalfør... |

1 - 15 ▸

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016: | 7.0 - Fiskivinnuviðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 08.05.2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference(0)

Noter(0)

## Filer i sagen

Ny e mail · Filhandlinger

| Titel | Status | Dok.nr |
|---|---|---|
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 23 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 22 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00213 21 |
| Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00213 20 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftunum | Udført | 18/00213 19 |
| 18-00213 17 Fyrispurningur viðv 370379_279791_0 | Udført | 18/00213 19 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftum | Udført | 18/00213 18 |
| 18-00213 17 Fyrispurningur viðv 370379_279791_0 | Udført | 18/00213 18 |
| Fyrispurningur viðv. landingarviðurskiftum | Behandles | 18/00213 17 |
| SV_ Menningarkvotur 2018 - Ískoyti til svarskriv | Udført | 18/00213 16 |
| móttøkuváttan | Udført | 18/00213 16 |
| Ískoyti til svarskriv | Behandles | 18/00213 15 |
| 13092018163619 | Udført | 18/00213 15 |
| Menningarkvotur 2018 - Ískoyti til svarskriv | Udført | 18/00213 15 |
| við undirskrift | Udført | 18/00213 15 |

1 - 15 ▸

FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Vestmanna Seafood
Bakkavegur 17
350 Vestmanna

eolsen@mail.fo

Stjórnarskrivstovan
9. november 2018
Mál: 18/00213-17
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

Tygara skriv:

**Fyrispurningur viðvíkjandi landingarviðurskiftum**

Vísandi til umsókn tykkara, dagfest 28. mai 2018, fingu tit tann 13. aug. 2018 í menningarkvotu tillutað 12.970 tons av svartkjafti í 2018, og fyri árini 2019, 2020 og 2021 fingu tit tillutað 10.400 tons av svartkjafti. Somuleiðis fingu tit í menningarkvotu tillutað 2.002 tons av makreli í 2018, og fyri árini 2019, 2020 og 2021 fingu tit tillutað 1.710 tons av makreli. Tit fingu at enda tillutað 1.593 tons av sild fyri árini 2018, 2019, 2020 og 2021. Víst var á, at tillutaðu kvoturnar verða stillaðar vísandi til § 4, stk. 2 í kunngerðini um menningarkvotur, har tað er ásett, at menningarkvota, ið er játtað fyri 2, 3 og 4 ár, verður seinnu árini lutað í sama lutfalli, prosentparti, av samlaðu føroysku kvotuni av ávísa fiskaslagnum, sum kvotan hevði fyrsta árið. Við ískoytisskrivi, dagfest 12. sept. 2018, bleiv tillutaða kvotan hækkað við 20% fyri svartkjaftin í árunum 2019, 2020 og 2021, og tillutaða kvotan fyri makrel og sild bleiv hækkað við 10% fyri øll árini.

Í fráboðaðu avgerðini stóð, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í tann mun hon ikki kann gagnnýtast innan fyri verkætlanina, skulu tit boða Fiskimálaráðnum frá hesum. Í umsóknini stóð m.a., at menningarætlanin skal fremjast í Vestmanna í Norðstreymoy, har Vestmanna Fiskavirki og Vestmanna Seafood eru heimahoyrandi.

Hóast allur makrelurin er landaður á Vestmanna Fiskavirki, hevur Vørn boðað Fiskimálaráðnum frá, at skipið Arctic Voyager, sum hevur fiskað størsta partin av norðhavssildini fyri tykkum, hevur landað góð 510 tons av norðhavssild á Pelagos í Fuglafirði, sum ikki lúkar økisrættarligu treytirnar í tilsøgnini. Tó er nógv tann størsti parturin av norðhavssildini landaður í Vestmanna.

Upplýsast skal, at sambært § 4, stk. 3 í kunngerðini um menningarkvotur stendur, at menningarætlanir, ið kvota er játtað til fyri 2, 3 ella 4 ár, skulu eftirmetast við ársbyrjan árið, ella árini, eftir, hon er játtað. Harumframt er ásett í § 4, stk. 4 í nevndu kunngerð, at um avgerandi treytir fyri játtanini til menningarkvotu sambært menningarætlanini ikki eru hildnar, kann landsstýrismaðurin nokta at endurnýggja ella lutvíst endurnýggja kvotuna.

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Vísandi til omanfyri standandi fer Fiskimálaráðið at biðja P/F Vestmanna Seafood um eina frágreiðing um, hví felagið hevur landað norðhavssild í Fuglafirði, tá ið umsókn og tilsogn eru treytaðar av, at okisrættaðu treytirnar vera hildnar. Freistin at geva frágreiðing verður ásett til **mikudagin 21. nov. 2018 kl. 12.00.** Um eingin frágreiðing verður latin innan ásettu freist, fer Fiskimálaráðið at umhugsa at taka stig á fyriliggjandi grundarlagi.

Avrit av hesum skrivi er sent Vorn til kunningar.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
Aðalstjóri

Torkil Vestergaard Rasmussen (Fiskimálaráðið - Sagsbehandler)

Hjem | Ny | Søg | Historisk søg | Funktioner | Mit arkiv | Alle disse ord | Indtast søgeord

Sagshistorik ▸ Journalsag FISK: Menningarkvotur 2018: Magnus Jespersen søkir vegna Delta Seafood P/F um menningarkvotur

Journalsag FISK: 18/00269

# Menningarkvotur 2018: Magnus Jespersen søkir vegna Delta Seafood P/F ...

Mere ▾

## Dokumenter (*)

Ny ▾ Vælg eller træk filer her

| Nr | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00269-15 | Avgerð fráboðað partinum | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00269-14 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-13 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-12 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-11 | Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-10 | Avgerð Fiskimálaráðsins | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-9 | Hoyringarsvar | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00269-8 | Ætlanarskriv fráboðað partinum | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00269-7 | Uppskot til skriv sent Rógva Reinert til góðkenningar | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00269-6 | Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn av fiska menningarkvotu í 2018 | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-5 | Ískoyti til svarskriv | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-4 | Avger - tillutan av menningarkvotu | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00269-3 | Rakstrarætlan 2018 - Delta Seafood | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00269-2 | Játtan av umsókn - Verkaetlan makrelur mai 2018 - Delta Seafood | Dokument u... | Journalfør... |
| 18/00269-1 | Verkaetlan makrelur mai 2018 - Delta Seafood | E-mail ind | Journalfør... |

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016: | 7.0 - Fiskivinnuviðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 28-05-2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference(0)

Noter(0)

## Filer i sagen

Ny e-mail | Filhandlinger ▾

| Titel | Status | Dok.nr |
|---|---|---|
| VS_ Avgerð um ávaring og herdar treytir viðvíkjandi makrelpa... | Udført | 18/00269-15 |
| Scannet på en multifunktionel Xerox-maskine | Udført | 18/00269-15 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00269-14 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00269-13 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00269-12 |
| Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00269-11 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Behandles | 18/00269-10 |
| Avgerð um ávaring og herdar treytir viðvíkjandi makrelpartin... | Behandles | 18/00269-10 |
| Scannet på en multifunktionel Xerox-maskine | Udført | 18/00269-10 |
| VS_ Avgerð um ávaring og herdar treytir viðvíkjandi makrelpa... | Behandles | 18/00269-10 |
| Scannet på en multifunktionel Xerox-maskine | Udført | 18/00269-10 |
| Aftursvar til afturtøku av menningarkvotu | Udført | 18/00269-9 |
| Fiskimálaráðið afturtøka av menningarkvotu ... | Udført | 18/00269-9 |
| Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn av fiska menningarkvotu... | Udført | 18/00269-8 |
| 18-00269-6 Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn av fiska men... | Udført | 18/00269-8 |

1 - 15 ▸

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Delta Seafood PF
Havnarlagið 20
800 Tvøroyri

magnus@deltaseafood.fo

**Stjórnarskrivstovan**
9. november 2018
Mál: 18/00269-6
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

**Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn um at fiska menningarkvotu í 2018**

Vísandi til umsókn tykkara, dagfest 28. mai 2018, fingu tit tann 3. sept. 2018 í menningarkvotu tillutað 900 tons av makreli og 873 tons av sild. Við ískoytisskrivi, dagfest 12. sept. 2018, bleiv tillutaða kvotan hækkað upp í 1.000 tons av makreli ávikavist 970 tons av sild.

Í fráboðaðu avgerðini stóð, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina, sum hon er góðkend av Fiskimálaráðnum. Skrivað stóð eisini, at broytingar í viðurskiftum viðvíkjandi verkætlanini skulu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum. Í umsóknini frá tykkum stóð m.a., at menningarætlanin verður framd í Suðuroy, og virkingarstaður er Suðuroy. Meiri ítøkiligt stóð, at framleiðslan á landi fer at fara fram á TG Seafood í Hvalba og Delta Seafood á Tvøroyri.

Fiskimálaráðið hevur verið í samskifti við Vørn og fingið upplýst, at skipið Arctic Voyager hjá P/F Jókini hevur landað gott og væl 940 tons av sild fyri tykkum á Pelagos í Fuglafirði.

Landingar, sum í so stóran mun eru framdar uttanfyri økið, ið umsókn og avgerð, eru grundaðar á, eru nýggjar faktuellar upplýsingar av stórum týdningi fyri avgerðina um at lata menningarkvotu til tykkum fyri 2018. Vísandi til hesar umstøður er ætlanin at taka tilsøgnina aftur at fiska menningarkvotu í 2018.

Heimildargrundarlagið hjá Fiskimálaráðnum fyri hesi ætlaðu afturtøku er óskrivaða meginreglan um afturtøku av givnum tilsagnum og víst verður eisini í hesum sambandi á fyrivarnið í tilsagnunum fyri broytingum, sum ikki liggja innanfyri verkætlanina, og sum ti ikki lúka grundleggjandi fyritreytir fyri tilsagnunum. Heldur ikki er broytingin fráboðað ella góðkend av Fiskimálaráðnum, sbr. skriv Fiskimálaráðsins, dagfest 3. sept. 2018 ávikavist 12. sept. 2018.

Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skulu nevndu upplýsingar um landing av norðhavssild uttanfyri Suðuroynna sendast tykkum til ummælis við freist **mikudagin 21.**

**nov. 2018 kl. 12.00**. Um einki hoyringarsvar verður latið Fiskimálaráðnum innan ásettu freist kann væntast, at avgerð verður tikin á fyriliggjandi grundarlagi.

Avrit av hesum ætlanarskrivi er sent Vorn til kunningar.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
Aðalstjóri

**Fiskimálaráðið** **Tvøroyri tann 09-11-2018**

**Aftur svar til mál 18/00269-6, um ætlunarskriv um afturtøku av menningarkvotu.**

Eg harmist um at Delta Seafood ikki hevur svara uppá skriv 3 og 12 september, men júst tá vistu vit onki hvussu leikur fór fram, men vísi til mail 25 oktober og tlf samrøðu sama dag, um broytingina í at fiska og virka sild hjá okkum, haldi ikki eg kundi verða meira opin og ærligur, um støðuna. Vit hava tikið ímóti góðum 50 tonsum til royndur, hóast vit als onga sølu hava, sum gevur nakað lønandi framleiðslu, men halda okkum hava funnið eitt produkt, sum fer at geva lønandi framleiðslu til komandi ár, har vit vóna at fáa menningarkvotu.

Tað kann vera, at eg havi misskilt støðuna, men eg skilti støðuna soleiðis frá samrøðuni tann 25 oktober, at tit ikki høvdu viðmerkingar, til at vit fiskaðu sildina sum vit gjørdu, nevnt bleiv eisini at sildin mátti fiskast. Hetta áðrenn vit fóru undir at fiska. So um vit høvdu skilt at tað fór at fáa avleiðingar fyri makrelkvotuna, høvdu vit ikki fiska sildina. Eg haldi at vit eftir umstøðunum hava kunnað tykkum á nøktandi hátt.

Tað hevur heldur ikki verið gjørligt at landa silduna í Suðuroynni, tí her sum aðrastaðini hava skip liggi í kø og bíða eftur landingartørni, og Vestmanna Seafood hevur heldur ikki megna at tikið ímóti .Má eisini nevna tann útav lagið vánaliga sildamarknaðin, kann nevna at ein kundi vit høvdu avtalu við um saltaða sild, leyp frá avtaluni.

Fyri makrelkvotuna hevur ætlanin verið at virka alla rávøruna á TG Seafood í Hvalba, og har eru als ongir trupulleikar við marknaðinum, tí kemur tykkara skriv, sum ein bumba undur virkseminum á TG Seafood í Hvalba, og serliga nú upsafiskiskapurin hevur svíkt so dyggiliga, sum annars er grundarlagið undur virkseminum í Hvalba, tí hevur makrelurin als stóran týdning fyri TG Seafood og tey 65 arbeiðsfólkini, sum eru knýtt at virkinum. Virkið hevur eisini gjørt íløgur at virka makrel, og rávøran skuldi serliga koma frá menningarkvotum.

Kann nevna at seinastu viku hevur virkið framleitt 144 tons av makreli og 20 tons av sild ( frá menningarkvotum ) og einans 31 tons av upsa, og hetta hevur verið myndin seinastu 2 mánðarnar, tí er lívsneyðugt at virkið fær alla tillutaðu menningarkvotuni hjá Delta Seafood og Steintór/TG Fish, alt annað verður ein katastrofa fyri virkið og bygdasamfelagið í Suðuroy Norðaru helvt.

Loyvi mær inniliga at heita á Fiskimálaráði, um ikki at taka menningarkvotuna frá Delta Seafood, tí sum eg havið roynt at vísa á, so rakar hon ongan annan aktør so meint, sum TG Seafood og tess arbeiðsfólk.

Eg skrivið hetta aftursvar so opi og ærligt sum eg kann, og royni at vísa á avleiðingarnar. Havið ikki leita mær sakkunnleika til at fyrireika aftursvarið, men brúkt vanligt vit og skil, og vóni at Fiskimálaráði brúkar líknandi leist.

Vinarliga

Magnus Jespersen

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Delta Seafood PF
Havnarlagið 20
800 Tvoroyri

Stjórnarskrivstovan
15. november 2018
Mál: 18/00269-10
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

Tygara skriv:

**Avgerð um ávaring og herdar treytir viðvíkjandi makrelpartinum**

Vísandi til ætlanarskriv, dagfest 9. nov. 2018, um afturtoku av tilsogn at fiska menningarkvotu í 2018 skal boðast frá, at Fiskimálaráðið við hesum fer at geva P/F Delta Seafood eina ávaring við herdum treytum um frameftir at gagnnýta restina av menningarkvotuni í 2018 innanfyri verkætlanina.

Fiskimálaráðið hevur sambært óskrivaðu fyrisitingarrættarligu meginregluni um afturtoku av givnum tilsagnum (*tilbagekaldelse af begunstigende forvaltningsakter*) heimild til at taka tilsogn aftur, og tískil hevur Fiskimálaráðið eisini, sum tað minna í tí meira, heimild til at geva ávaring fyri brot á grundleggjandi fyritreytir, eins og Fiskimálaráðið hevur heimild til at áseta herðandi treytir.

Fiskimálaráðið skal í hesum sambandi vísa á fyrivarnið í tilsagnunum fyri broytingum, sum ikki liggja innan fyri verkætlanina, og sum tí ikki lúka tær grundleggjandi okistrættarligu fyritreytirnar, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini at tilluta Delta Seafood menningarkvotu fyri 2018, sbr. avgerðir, dagfestar 3. sept. 2018, ávikavist ískoytisskriv Fiskimálaráðsins, dagfest 12. sept. 2018, um at kvotan skuldi gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Harumframt var ásett í skrivinum, dagfest 12. sept. 2018, at broytingar skuldu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum.

Fiskimálaráðið hevur fingið upplýst frá Vorn, at skipið Arctic Voyager hjá P/F Jókin, sum hevur fiskað menningarkvotu fyri tykkum, hevur landað uml. 940 tons av norðhavssild í Fuglafirði. Talan er um menningarkvotu. Sostatt er so at siga øll sildakvotan hjá Delta Seafood gagnnýtt uttanfyri verkætlanina, og hetta er gjørt uttan fráboðan ella góðkenning frá Fiskimálaráðnum, sum annars var ásett í treytunum.

Landingar, sum í so stóran mun eru framdar uttan fyri økið, ið umsókn og avgerð eru grundaðar á, eru nýggjar faktuellar upplýsingar av stórum týdningi fyri avgerðina um at lata menningarkvotu til tykkum fyri 2018.

Tit blivu partshoyrdir um hesar veruligu umstøður tann 9. nov. 2018. Tann 12. nov. 2018 góvu tit Fiskimálaráðnum hoyringarsvar, har tit m.a. vísa á, at tað ikki hevur verið gjørligt at landa sildina í Suðuroynni, tí skip hava ligið í kø og bíðað eftir landingartorni, og

Ministry of Fisheries

Vaktaravegur (?) Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Vestmanna Seafood hevur heldur ikki megnað at tikið ímóti. Harumframt verður upplýst í hoyringarsvarinum, at ein kundi, sum tit hovdu avtalu við um saltaða sild, leyp frá avtaluni.

Somuleiðis verður kunnað um í hoyringarsvarinum, at tað fyri makrelkvotuna hevur verið ætlanin at virka alla rávoruna á TG Seafood í Hvalba, og at har als ongir trupulleikar eru við marknaðinum, og tí kemur skriv Fiskimálaráðsins, sum ein bumba undir virkseminum á TG Seafood í Hvalba, og serliga nú upsafiskiskapurin hevur svikið so dyggiliga, sum annars er grundarlagið undir virkseminum í Hvalba. Mett verður, at makrelurin hevur alstóran týdning fyri TG Seafood og tey 65 arbeiðsfólkini, sum eru knýtt at virkinum. Upplýst verður í hoyringarsvarinum, at virkið hevur eisini gjørt íløgur at virka makrel, og rávoran skuldi serliga koma frá menningarkvotum.

Sum tykkum kunnugt, og sum Fiskimálaráðið eisini hevur partshoyrt tykkum um, er so at siga øll sildakvotan hjá tykkum gagnnýtt uttanfyri verkætlanina, og hetta er gjørt uttan fráboðan ella góðkenning frá Fiskimálaráðnum. Víst verður í hesum sambandi til fyrivarnið í givnu tilsagnunum og skylduna at boða Fiskimálaráðnum frá broytingum og treytina um góðkenning. Soleiðis sum tit hava upplýst fyri Fiskimálaráðnum í hoyringarsvari tykkara, hevur ikki verið gjørligt hjá tykkum at landa sildina í Suðuroynni. Í umsóknini frá tykkum stóð m.a., at menningarætlanin verður framd í Suðuroy, og virkingarstaður er Suðuroy, og at framleiðslan á landi fer at fara fram á TG Seafood í Hvalba og Delta Seafood á Tvøroyri. Sildaparturin av menningarkvotuni er tískil ikki samsvarandi umsókn og tilsagnum. Um tað hevði verið kent frammanundan, at so at siga øll sildakvotan fór til Fuglafjarðar, soleiðis sum gjørt er, hovdu tit allarhelst ikki fingið tillutað menningarkvotu, tí økisrættarliga atlitið í Hvalba bar í stóran mun avgerðina at tilluta Delta Seafood menningarkvotu fyri 2018.

Vísandi til omanfyri standandi fer Fiskimálaráðið hervið at geva P/F Delta Seafood eina álvarsliga ávaring, tí sildaparturin av menningarkvotuni ikki er gagnnýttur samsvarandi umsókn og tilsagnum. Stigið er avmarkað til eina álvarsliga ávaring, tí staðfest er í hoyringarskrivinum, at frameftir verður øll makrelkvotan gagnnýtt samsvarandi verkætlanini. Í hesum sambandi skal sagt vera frá, at um varðveitta makrelkvotan verður gagnnýtt uttanfyri verkætlanina uttan fráboðan og góðkenning frá Fiskimálaráðnum, kann væntast, at hesin partur verður tikin aftur.

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, og Fiskimálaráðið ger fyribils ikki meiri við málið.

Avrit av hesi avgerð er sent Vørn til kunningar.

Røgvi Reinert
aðalstjóri

Journalsag FISK: 18/00243

# Menningarkvotur 2018: P/F Vørðustiggjur, Húsavík, søkir um menningark...

Mere

## Dokumenter (*)

Ny Vælg eller træk filer her

| Nr | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00243 6 | Ætlanarskriv um afturtøku | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243 5 | Svar til umsókn um menningarkvotur 2018 | Dokument u... | Journalfør... |
| 18/00243 4 | Menningarkvota P/F Vørðustiggjur | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00243 3 | Ískoyti til svarskriv | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243 2 | Tilsøgn - Umsókn um menningarkvotu: Jógvan Páll Lassen adv. vegna P/F Vørðustiggjur | Dokument u... | Journalfør... |
| 18/00243 1 | Umsókn um menningarkvotu: Jógvan Páll Lassen adv vegna P/F Vørðustiggjur | E-mail ind | Journalfør... |

16 - 21

## Filer i sagen

Ny e-mail Filhandlinger

| Titel | Status | Doknr |
|---|---|---|
| VS_ Avgerð um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu I... | Udført | 18/00243-21 |
| Scanned from a Xerox Multifunction Printer | Udført | 18/00243-21 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-20 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-19 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-18 |
| Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00243-17 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Udført | 18/00243-16 |
| 18-00243-11 Avgerð Fiskimálaráðsins 370234_279737_0 | Udført | 18/00243-16 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Udført | 18/00243-15 |
| 18-00243-11 Avgerð Fiskimálaráðsins 370234_279737_0 | Udført | 18/00243-15 |
| Menningarkvota P_F Vørðustigjur | Udført | 18/00243-14 |
| hoyringssvar | Udført | 18/00243-14 |
| SV_ longd svarfreist | Udført | 18/00243-13 |
| longd svarfreist | Udført | 18/00243-12 |
| longd svarfreist | Udført | 18/00243-12 |

1 - 15

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016: | 7.0 - Fiskivinnuvíðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 28-05-2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference (*)

Noter(0)

Torkil Vestergaard Rasmussen (Fiskimálaráðið - Sagsbehandler)

Hjem | Ny | Søg | Historisk søg | Funktioner | Mit arkiv | Alle disse ord | Indtast søgeord

Sagshistorik » Journalsag FISK: Menningarkvotur 2018: P/F Vørðustíggjur, Húsavík, søkir um menningarkvotu

Journalsag FISK: 18/00243

# Menningarkvotur 2018: P/F Vørðustíggjur, Húsavík, søkir um menningark...

Mere

## Dokumenter (*)

Ny · Vælg eller træk filer her

| Nr | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00243-21 | Avgerð fráboðað partinum | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00243-20 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243-19 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243-18 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243-17 | Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243-16 | Tillagað uppskot til avgerð sent Rogva Reinert til góðkenningar (innanhýsis) | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00243-15 | Uppskot til avgerð sent Rógva Reinert til góðkenningar | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00243-14 | Hoyringarsvar frá Jógvan Páll Lassen vegna felagið | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00243-13 | SV: longd svarfreist og kunning um boð til Vørn | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00243-12 | longd svarfreist - Menningarkvotur 2018: P/F Vørðustiggjur, Husavik, søkir um menningarkvotu | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00243-11 | Avgerð Fiskimálaráðsins | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00243-10 | VS. P/F Vørustiggjur | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00243-9 | Vørðustiggjur. Fiskiloyvi. | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00243-8 | Aðalstjórin góðtekur við nøkrum rættingum | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00243-7 | Uppskot til ætlanarskriv um afturtøku sent aðalstjóranum til góðkenningar | E-mail ud | Journalfør... |

1 - 15 ▸

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016: | 7.0 - Fiskivinnuvíðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 28-05-2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference (*)

Noter(0)

## Filer i sagen

Ny e-mail · Filhandlinger

| Titel | Status | Dok.nr. |
|---|---|---|
| VS_ Avgerð um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu f... | Udført | 18/00243-21 |
| Scanned from a Xerox Multifunction Printer | Udført | 18/00243-21 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-20 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-19 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00243-18 |
| Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00243-17 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Udført | 18/00243-16 |
| 18-00243-11 Avgerð Fiskimálaráðsins 370234_279737_0 | Udført | 18/00243-16 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Udført | 18/00243-15 |
| 18-00243-11 Avgerð Fiskimálaráðsins 370234_279737_0 | Udført | 18/00243-15 |
| Menningarkvota P_F Vørðustigjur | Udført | 18/00243-14 |
| hoyringssvar | Udført | 18/00243-14 |
| SV_ longd svarfreist | Udført | 18/00243-13 |
| longd svarfreist | Udført | 18/00243-12 |
| longd svarfreist | Udført | 18/00243-12 |

1 - 15 ▸

# FISKIMÁLARÁÐIÐ

Vorustiggjur
Att.: Jógvan Páll Lassen, advokatur
jpl@lawfirm.fo
tdl@lawfirm.fo

**Stjórnarskrivstovan**
1. november 2018
Mál: 18/00243-6
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR / IVR

Tygara skriv: JPL/tdl j.nr. 1741802

**Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018**

Vísandi til umsókn frá klienti tygara, P/F Vorustiggjur, dagfest 28. mai 2018, fekk nevnda felag tann 13. aug. 2018 tillutað 1.171 tons av makreli í 2018 ávikavist 900 tons av sild í 2018, ið m.a. var treytað av, at høvuðsstættirnir í ætlanini, harundir avtala viðvíkjandi virkinum á Sandi blivu skjalprógvaðar. Boðað var frá, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í tann mun kvotan ikki kundi gagnnýtast innan fyri verkætlanina, skuldi felagið boða Fiskimálaráðnum frá hesum. Fiskimálaráðið tilskilaði sær rættin at taka aftur tann partin av kvotuni, sum ikki kann gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í avgerðini stóð eisini, at ókisrættaðu treytirnar taldu somikið nógv, at Metingarnevndin mælti landsstýrismanninum til at ganga umsóknini á móti undir nøkrum nærri ásettum treytum.

Vísandi til ta umstøðu, at allar umsóknirnar ikki vórðu viðgjørdar endaliga tann 13. aug. 2018, blivu tí 10% av sild ávikavist makrel afturhildin. Fiskimálaráðið boðaði klienti tygara frá í ískoytisskrivi, dagfest 12. sept. 2018, at tillutaða nøgdin bleiv 1.301 tons av makreli í 2018 og 1.000 tons av sild í 2018.

Tann 14. sept. 2018 boðaðu tygum frá vegna P/F Vorustiggjur, at eingin møguleiki var kortini fyri at gera nakað á virkinum á Sandi í 2018. Men víst var á, at møguleiki var fyri, at virkið í Skopun í verandi líki – kanska við onkrum smærri broytingum – kundi taka ávísa nøgd av játtaðu menningarkvotuni, soleiðis at neyðug atlit vórðu tikin til okið, har kvotan er tillutað. Trupult var tó at siga, hvussu nógv kundi fara tann vegin, tá ið hetta ikki var roynt áður, men sum mest skuldi leggjast upp í Skopun. Harumframt bleiv upplýst, at felagið hevur verið í samband við virkið í Hvalba, og teir eru til reiðar at taka restina.

Tann 17. sept. 2018 boðaði Fiskimálaráðið frá, at upplýsingarnar frá 14. sept. 2018 vóru viðgjørdar, og verkætlanin fekk tillutað 1.301 tons av makreli ávikavist 1.000 tons av sild í menningarkvotu. Fiskimálaráðið staðfesti, at tillutaða kvotan skuldi gagnnýtast innan fyri verkætlanina og teimum upplýsingum, ið latnar vóru ráðnum. Boðað var eisini frá í skrivinum, at broytingar í verkætlanini skuldu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum.

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tann 25. okt. 2018 boðaðu tygum frá vegna P/F Vorustiggjur, at samstarvið við Sandoy Seafood ikki var komið í lag og ikki sær út til at koma ígongd vísandi til, at partarnir ikki blíva samdir um treytir fyri avreiðing, avrokning, framleiðslu og sølu umframt viðurskiftini og gjalding fyri neyðugar meirilogur.

Tann 31. okt. 2018 var Fiskimálaráðið í samskifti við Vørn um landing av menningarkvotu, ið Eystur- og Vesturbúgvin higartil í ár hava fiskað. Vørn hevur váttað fyri Fiskimálaráðnum, at nevndu trolarar hava avreitt umleið 240 tons av makreli í Fuglafirði, ið er menningarkvota. Harnæst varð kunnað um, at trolararnir hava avreitt umleið 260 tons av norðhavssild í Fuglafirði, ið eisini er menningarkvota. Somuleiðis varð kunnað um, at onki av nevndu menningarkvotu higartil er landað í Sandoynni ella í Hvalba.

Landingar, ið fult og heilt eru framdar uttanfyri økið, ið umsókn og tilsøgn eru grundað á, er nýggjur faktuellur upplýsingur av stórum týdningi fyri avgerðirnar um at lata menningarkvotur, sum ikki er til fyrimuns fyri klient tygara. Vísandi til hesar umstøður er ætlanin tí at taka tilsøgnina at fiska menningarkvotu í 2018 aftur.

Heimildargrundarlagið hjá Fiskimálaráðnum fyri hesum er óskrivaða fyrisitingarrættarliga meginreglan um afturtøku av givnum tilsagnum og víst verður eisini í hesum sambandi á fyrivarnið í tilsagnunum fyri broytingum, sum ikki liggja innan fyri verkætlanina, og sum tí ikki lúka økisrættaðu treytirnar. Heldur ikki er broytingin fráboðað ella góðkend av Fiskimálaráðnum, sbr. tilsagnarskriv Fiskimálaráðsins til P/F Vorustiggjur frá 13. aug. 2018 og 17. sept. 2018.

Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skulu nevndu upplýsingar um landing av sild og makreli uttan fyri økið "Sandoy / Hvalba" sendast tygum og klienti tygara til ummælis við **freist til 7. nov. 2018 kl. 12.00**. Um einki hoyringarsvar verður latið Fiskimálaráðnum innan ásettu freist kann væntast, at avgerð tikin á fyriliggjandi grundarlagi.

Avrit av hesum ætlanarskrivi er sent Vørn til kunningar.

Blíðar heilsur

Røgvi Reinert
aðalstjóri

**Advokatfelagið við Strond 4 Í/F**

JÓGVAN P. LASSEN
PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN
ANNA DAM
INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN
JULIANNA KLETT

Fiskimálaráðið
Att: Rógvi Reinert, aðalstjóri
Yviri við Strond 17
100 Tórshavn

Tórshavn, 9. november 2018
JPL/tdl j.nr. 1741802
Tórunn D. Lassen beinl. +298 203059
tdl@lawfirm.fo

**Viðv.: Tykkara máli nr. 18/00243-6 – ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018**

---

Vísandi til skriv tykkara frá 1. november 2018, so hevur undirritaði nú havt høvi til at viðgera málið við mín klient við atliti til veruligu umstøðurnar í málinum.

Tá ið fiskiskapurin eftir menningarkvotu var farin í gongd, var ætlanin at avreiða í Skopun og Hvalba sambært givnu tilsøgn, men vísti tað seg, at Skopun noktaði at taka ímóti, um ikki serlig avtala varð gjørd, og viðleggi eg í hesum sambandi til kunningar uppskot til avtalu frá P/F Sandoy Seafood.

Sambært avtaluuppskotinum, so var P/F Sandoy Seafood tryggjað uppá allar mátar - eitt skiftisavlop uppá kr. 1,50 pr. kilo, 4% í sølugjaldi, fult gjald fyri allar umvælingar trektar av avrokning, umframt dekning fyri allar útreiðslur av flutningi v.m. til sølustað, alt uttan at P/F Vørðustíggjur hevði ávirkan á nøkur viðurskiftir hesum viðvíkjandi, samstundis sum felagið skuldi hava ábyrgd fyri møguligum reklamatiónum. Tað verður tí ógjørligt at avrokna manning eftir hesum leisti.

Tað sum upprunaliga lá í kortunum var, at ein minni tillaging skuldi gerast á virkinum í Skopun - mett til ca. kr. 1 mió. og sum kundi taka nakrar dagar at fáa gjørt - samstundis sum reiðarí og virki hvør sær kundu fáa tær neyðugu royndirnar viðvíkjandi hesi veiðu, men noktaði virkið fyri yvirhøvur at taka ímóti rávøru, um ikki viðlagda avtala varð undirskrivað.

Mett verður, at avtalutreytirnar eru púra disproportinalar, vísandi til eina minni íløgu á virkinum í Skopun, og til tær minnu nøgdir, sum virkið kundi taka ímóti.

Undirritaði boðaði Fiskimálaráðnum við skrivi, dagf. 25. oktober 2018 loyalt frá hesi støðu, so at eingin misskiljing skuldi vera.

Hvat viðvíkur avreiðing í Hvalba, so er seinasti túrur í síni heild avreiddur í Hvalba, meðan teir báðir fyrru túrarnir ikki eru avreiddir í Hvalba, vísandi til, at Hvalba ikki hevði møguleika fyri at taka ímóti tá ið virkið reint tekniskt ikki varført fyri hesum, hóast meiningin allatíðina var at avreiða har. Tá ið so var, varð neyðugt at sleppa av við veiðuna aðrastaðni. Ynski hjá reiðaríinum er at avreiða í Hvalba, og er ætlanin at framtíðarveiða skal avreiðast í Hvalba, um ikki eigarin av P/F Sandoy Seafood skiftir meining, har talan kann blíva um meira "normal" avreiðingarviðurskiftir millum virki og skip.

Samanumtikið metir mín klientur, at ætlanin í hoyringsskrivinum er eitt alt ov ógvusligt og víttgangandi stig mótvegis hesum lítla felag, sum loyalt hevur upplýst um teir trupulleikar, teir komu í, við atliti til at halda seg til treytirnar, sum upprunaliga blivu givnar, samstundis sum reiðaríið og almenningurin eru vitandi um, at meginparturin av tillutaðari menningarkvotu hjá øðrum er avreiddur til tey frammanundan etableraðu virkini, samstundis sum aðrar menningarkvotur sambært KVF eru fluttar frá vanligum fiskiskipum í Hvalba og aðrastaðni til eitt stórt tradionelt uppisjóvarskip, sum enntá hevur útlendskar eigarar, har Hvalba og Vestmanna Fiskavirki ongan møguleika hava at taka ímóti einari so stórari last í senn frá hesum skipi.

Sæð í ljósinum av hesi støðu, tykist tað púra burturvið so harðliga at leggja eftir einum lítlum reiðarí við einum skipi, sum loyalt og við kurteisi hevur roynt at hildið seg til reglurnar, og loyalt hevur kunnað um hetta, tá ið endamálið ikki varð rokkið, meðan tað sær út sum aðrir kunnu hóreiggja sær akkurát sum teir vilja uttan nakað.

Virðingarmest

Jógvan P. Lassen, adv.
jpl@lawfirm.fo
tlf. 513996

FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Vorðustiggjur
Att.: Jógvan Páll Lassen, advokatur

Stjórnarskrivstovan
15. november 2018
Mál: 18/00243-11
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

Tygara skriv: JPL/tdl j.nr.:
1741802

**Avgerð um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018**

Vísandi til ætlanarskriv, dagfest 1. nov. 2018, um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018 skal boðast frá, at Fiskimálaráðið hervið tekur aftur tilsøgnina hjá P/F Vorðustiggjur at fiska menningarkvotu í 2018.

Heimildargrundarlagið hjá Fiskimálaráðnum at taka aftur eina avgerð er óskrivaða fyrisitingarrættarliga meginreglan um afturtøku av givnum tilsagnum (*tilbagekaldelse af begunstigende forvaltningsakter*). Í hesum sambandi verður víst á fyrivarnið fyri broytingum í tilsagnunum, sum ikki liggja innan fyri verkætlanina, og sum í stóran mun ikki lúka tær grundleggjandi økisrættarligu fyritreytirnar, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini at tilluta klienti tygara menningarkvotu fyri 2018, sbr. avgerð, dagfest 13. aug. 2018, ávikavist ískoytisskriv Fiskimálaráðsins, dagfest 12. sept. 2018, um at kvotan skuldi gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Harumframt var ásett í ískoytisskrivinum, dagfest 12. sept. 2018, at broytingar skuldu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum. Hetta bleiv eisini endurtikið í avgerðini tann 17. sept. 2018, eftir at tygum vegna P/F Vorðustiggjur tann 14. sept. 2018 bóðu Fiskimálaráðið um loyvi at sleppa at leggja sum mest upp á land í Skopun og restina í Hvalba.

Í avgerðini at tilluta P/F Vorðustiggjur menningarkvotu fyri 2018 taldu økisrættaðu treytirnar á Sandoynni so mikið nógv, at Metingarnevndin mælti landsstýrismanninum til at luta part av menningarkvotuni fyri 2018 til felagið.

Tann 31. okt. 2018 var Fiskimálaráðið í samskifti við Vorn um m.a. landing av menningarkvotu, ið skipini hjá P/F Vorðustiggjur, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, higartil í ár hovdu fiskað. Vorn váttaði fyri Fiskimálaráðnum, at nevndu trolarar hovdu avreitt umleið 240 tons av makreli í Fuglafirði, ið er menningarkvota. Harnæst varð kunnað um, at trolararnir hovdu avreitt umleið 260 tons av norðhavssild í Fuglafirði, ið eisini er menningarkvota. Dagførd tøl vísa, at tølini eru uml. 344 tons av makreli og 355 tons av sild.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Somuleiðis varð kunnað um, at onki av nevndu menningarkvotum pr. 31. okt. 2018 var landað á Sandoynni ella í Hvalba, hóast tað vísir seg seinni, at nakað er landað í Hvalba. Viðmerkjast skal, at Hvalba bert skuldi taka eina rest, ið ikki kundi leggjast upp á Sandoynni, og sostatt var Hvalba heldur ikki týðandi fyri okisatlitið hjá klienti tygara. Hvalba var so at siga ein loysn við góðkenning frá Fiskimálaráðnum, um tað í undantaksføri ikki bar til at leggja tað mesta upp á Sandoynni.

Landingar, sum í so stóran mun eru framdar uttanfyri okið, ið umsókn og tilsogn/avgerð er grundað á, eru avgerandi upplýsingar, sum broyta grundleggjandi fyritreytir fyri avgerðunum dagfestar ávikavist 13. aug. 2018, 12. sept. 2018 og 17. sept. 2018, sbr. eisini fyrivarnið í nevndu avgerðum.

Tygum og klientur tygara blivu partshoyrdir um hesar veruligu umstøður tann 1. nov. 2018. Tann 7. nov. 2018 bóðu tygum um longda hoyringarfreist til týsdagin 13. nov. 2018, sum Fiskimálaráðið sama dag gekk á móti. Samstundis boðaði Fiskimálaráðið frá, at ráðið tann 1. nov. 2018 hevur givið Vørn boð um fyribils ikki at útskriva fleiri fiskiloyvi til P/F Vorðustiggjur um at fiska menningarkvotu, meðan hetta málið verður viðgjørt. Tann 9. nov. 2018 góvu tygum Fiskimálaráðnum hoyringarsvar, sum m.a. vísir til ósemjuna millum klient tygara og virkið í Skopun, P/F Sandoy Seafood. Tygum vísa m.a. á í hoyringarskrivinum, at virkið í Skopun noktaði at taka ímóti, um ikki serlig avtala varð gjørd, eins og tygum vilja vera við, at tað hevði verið ógjørligt at avrokna manning eftir leistinum í avtaluni, eins og tygum vilja vera við, at avtalutreytirnar vóru púra disproportionalar, vísandi til eina minni íløgu á virkinum í Skopun og til tær minnu nøgdir, sum virkið kundi taka ímóti.

Hesar umstøður vísa samstundis, at tað so at siga er ógjørligt hjá P/F Vorðustiggjur at lúka økisrættarligu fyritreytirnar á Sandoynni.

Tann umstøða, at P/F Vorðustiggjur boðar Fiskimálaráðnum frá viðurskiftunum tann 25. okt. 2018, verður ikki mett at geva P/F Vorðustiggjur rætt til av sínum eintingum at broyta grundleggjandi fyritreytir í tilsagnum frá einum myndugleika, soleiðis at økisrættarliga fyritreytin ikki longur skal lúkast. Fiskimálaráðið boðaði frá í tilsagnunum, dagfestar ávikavist 12. og 17. sept. 2018, at broytingar skulu góðkennast av Fiskimálaráðnum.

Tygara sjónarmið um aðrar aktørar verður hvørki mett sakligt ella viðkomandi fyri hetta mál, tí tað eru mál, ið Fiskimálaráðið viðger fyri seg.

Í mun til tað, ið tygum føra fram viðvíkjandi proportionalitetinum hevur Fiskimálaráðið lagt dent á tær grundleggjandi fyritreytirnar fyri at tilluta klienti tygara menningarkvotu, har økisrættaða atlitið á Sandoynni - og fyri ein minni part í Hvalba - og endamálið við skipanini við menningarkvotum sambært lóggávuni verður mett at viga munandi tyngri enn *møguligt* góðvarni hjá klienti tygara, tá ið talan er um ein munandi part av tillutaðu kvotuni, ið ikki verður gagnnýttur innan fyri verkætlanina - uttan góðkenning frá Fiskimálaráðnum.

Um hesi viðurskifti vóru kend frammanundan, høvdu menningarkvotur allarhelst ikki verið tillutaðar klienti tygara, tí økisrættarliga atlitið á Sandoynni bar avgerðina at tilluta P/F Vorðustiggjur menningarkvotu, og sostatt hevur klientur tygara ikki verið fyri nøkrum missi, tí klientur tygara hevur fingið nakað, sum hann allarhelst ikki hevði fingið, um so var,

at tað var ein kend umstøða, at ætlanin var at landa so stóran part av menningarkvotuni uttan fyri Sandoynna.

Av tí sama verður ikki mett, at ein ávaring o.tíl. minni inntriv hevði verið eitt hóskandi stig, tí tá hevði líkskapanarreglan havt við sær, at onnur, sum í sama mun ikki lúka ókisrættarligu fyritreytirnar, eisini kundu framt líknandi brot á grundleggjandi fyritreytir, ið hava verið berandi fyri tilsagnirnar - uttan at missa loyvi í fyrstu atløgu. Sostatt tala eisini saklig og viðkomandi atlit til at handhevja lóggávuna og at yvirhalda ókisrættarligu fyritreytirnar samsvarandi endamálinum við menningarkvotum fyri at taka avgerðina aftur.

Tó skal boðast frá, at P/F Vorðustiggjur fram **til og við hósdagin 22. nov. 2018 kl. 16.00** fær eina seinastu freist at fáa viðurskiftini skipað soleiðis, at sum mest av verkætlanini verður gagnnýtt á Sandoynni samsvarandi longu givnum tilsagnum, og innan ásettu freist at boða Fiskimálaráðnum frá, hvort hetta ber til. Um tað ikki ber til innan ásettu freist, verður tilsøgnin um at tilluta P/F Vorðustiggjur menningarkvotu fyri 2018 tikin aftur við virknaði frá tí løtu, at nevnda freist gongur út, og harvið missir felagið rættin at fiska menningarkvotu í 2018.

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, og Fiskimálaráðið ger ikki meiri við málið.

Avrit av hesi avgerð er sent Vørn til kunningar.

**Rógvi Reinert**
aðalstjóri

Torkil Vestergaard Rasmussen (Fiskimálaráðið - Sagsbehandler)

Hjem Ny Søg Historisk søg Funktioner Mit arkiv Alle disse ord Indtast søgeord

Sagshistorik ▸ Journalsag FISK: Menningarkvotur 2018: P/F Steintór og P/F TG Fish, Mikkjal Hammer søkir um menningarkvotur

Journalsag FISK: 18/00262

# Menningarkvotur 2018: P/F Steintór og P/F TG Fish, Mikkjal Hammer søk...

Mere

## Dokumenter (*)

Ny · Vælg eller træk filer her

| Nr. | Titel | Kategori | Status |
|---|---|---|---|
| 18/00262-15 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-14 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-13 | Menningarkvotur 2018.xlsx | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-12 | Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-11 | Avgerð Fiskimálaráðsins | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-10 | Hoyringarsvar frá Magnus Jespersen | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00262-9 | Menningarkvotur - Menningarkvotur 2018: P/F Steintór og P/F TG Fish, Mikkjal Hammer søkir um menningarkvotur | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00262-8 | Ætlanarskriv fráboðað partinum | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00262-7 | Uppskot til ætlanarskriv sent Rógva Reinert til góðkenningar | E-mail ud | Journalfør... |
| 18/00262-6 | Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018 | X - Intern... | Reserveret |
| 18/00262-5 | Ískoyti til svarskriv | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-4 | Avgerð um tillutan av menningarkvotu | Dokument u... | Reserveret |
| 18/00262-3 | Umbiðnu upplýsingar - Menningarkvotur 2018 | E-mail ind | Journalfør... |
| 18/00262-2 | Tilsøgn - umsókn um menningarkvotu 2018 - Mikkjal Hammer | Dokument u... | Journalfør... |
| 18/00262-1 | umsókn um menningarkvotu 2018 - Mikkjal Hammer | E-mail ind | Journalfør... |

## Detaljer

Tilføj en frist

| | |
|---|---|
| Status: | Under behandling |
| Ansvarlig enhed: | Fiskimálaráðið |
| Ansvarlig person: | Heri Joensen |
| Klassifikationskode: | Uklassificeret |
| Adgangsgruppe: | Fiskimálaráðið |
| Málsøki 2016 | 7.0 - Fiskivinnuviðurskifti |
| Projekt: | |
| Oprettet dato: | 28-05-2018 |

Tags

Kontakter

Sagsreference(0)

Noter(0)

## Filer i sagen

Ny e-mail · Filhandlinger

| Titel | Status | Dok.nr |
|---|---|---|
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00262-15 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00262-14 |
| Menningarkvotur 2018.xlsx | Behandles | 18/00262-13 |
| Skannað í VØRN á XC-7225.pdf | Udført | 18/00262-12 |
| Avgerð Fiskimálaráðsins | Behandles | 18/00262-11 |
| Aftursvar til afturtøku av menningarkvotu | Udført | 18/00262-10 |
| Fiskimálaráðið afturtøka av menningarkvotu ... | Udført | 18/00262-10 |
| Menningarkvotur | Udført | 18/00262-9 |
| Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu... | Udført | 18/00262-8 |
| 18 00262-6 Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska men... | Udført | 18/00262-8 |
| Uppskot til ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska me... | Udført | 18/00262-7 |
| 18-00262-6 Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska men... | Udført | 18/00262-7 |
| Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu... | Behandles | 18/00262-6 |
| Ískoyti til svarskriv | Behandles | 18/00262-5 |
| 13092018163031 | Udført | 18/00262-5 |

1 - 15

FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Steintór og P/F TG Fish
Att.: Mikkjal Hammer og Jacob Pauli Hammer

steintor@olivant.fo

**Stjórnarskrivstovan**
9. november 2018
Mál: 18/00262-6
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

Tygara skriv:

**Ætlanarskriv um afturtøku av tilsøgn um at fiska menningarkvotu í 2018**

Vísandi til umsókn tykkara, dagfest 28. mai 2018, fingu tit tann 13. aug. 2018 í menningarkvotu tillutað 900 tons av makreli ávikavist 900 tons av sild í 2018, sum við ískoytisskrivi, dagfest 12. sept. 2018, bleiv hækkað til 1.000 tons av makreli ávikavist 1.000 tons av sild í 2018. Treytirnar, sum fylgdu við avgerðini at tilluta tykkum menningarkvotu fyri 2018 vóru, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina, sum hon er góðkend av Fiskimálaráðnum. Samstundis var boðað frá, at broytingar í viðurskiftunum viðvíkjandi verkætlanini skulu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum. Í umsóknini frá tykkum stóð m.a., at menningarætlanin skal fremjast í Suðuroy við seroki í Hvalba, har arbeiðsloysið er stórt. Skrivað stendur eisini, at tað við betri rakstrargrundarlagi er møguligt at varðveita tey arbeiðspláss, sum eru.

Fiskimálaráðið hevur fingið upplýst frá Vørn, at skipið Arctic Voyager hjá P/F Jókini, sum hevur fiskað menningarkvotu fyri tykkum, hevur landað uml. 950 tons av norðhavssild til Pelagos í Fuglafirði. Talan er um menningarkvotu. Sostatt er næstan helmingurin av samlaðu menningarkvotuni, ella so at siga øll sildakvotan hjá tykkum, gagnnýtt uttanfyri verkætlanina, og hetta er gjørt uttan fráboðan ella góðkenning frá Fiskimálaráðnum.

Landingar, sum í so stóran mun eru framdar uttan fyri økið, ið umsókn og avgerð eru grundaðar á, eru nýggjar faktuellar upplýsingar av stórum týdningi fyri avgerðina um at lata menningarkvotu til tykkum fyri 2018. Vísandi til hesar umstøður er ætlanin at taka tilsøgnina aftur at fiska menningarkvotu í 2018.

Heimildargrundarlagið hjá Fiskimálaráðnum fyri hesi ætlaðu afturtøku er óskrivaða meginreglan um afturtøku av givnum tilsagnum, og víst verður eisini í hesum sambandi á fyrivarnið í tilsagnunum fyri broytingum, sum ikki liggja innan fyri verkætlanina, og sum tí ikki lúka grundleggjandi fyritreytir fyri tilsagnunum. Heldur ikki er broytingin fráboðað ella góðkend av Fiskimálaráðnum, sbr. skriv Fiskimálaráðsins, dagfest 13. aug. 2018 ávikavist 12. sept. 2018.

Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skulu nevndu upplýsingar um landing av norðhavssild uttan fyri Suðuroynna sendast tykkum til ummælis við **freist til mikudagin 21. nov. 2018 kl. 12.00**. Um einki hoyringarsvar verður latið Fiskimálaráðnum innan ásettu freist kann væntast, at avgerð verður tikin á fyriliggjandi grundarlagi.

Avrit av hesum ætlanarskrivi er sent Vørn til kunningar.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
Aðalstjóri